


[www.oljan.fo](http://www.oljan.fo)

**Jan Müller** 08 - 01 - 2012

# FAS fylgir frálandavinnuni

Tað hevði verið hugaligt at fingið skip av hesum slag inn í okkara FAS skipan. Hetta sigur Tommy Petersen, stjóri í Sjóvinnustýrinum, eftir at hava vitjað umborð á heimsins størsta kaðalskipi av sínum slag, tá tað lá á Havnini fyrrapartin fríggjadagin. Fólkini í Sjóvinnustýrinum fylgja væl við eitt nú, hvat hendir í frálandavinnuni, sum er í stórum vøkstri. Hann vísir á, at tað longu eru svensk reiðarí, sum hava frálandaskip, ið arbeiða á havbotninum, ið eru í FAS skipanini, men tey eru nógv minn. Tommy Petersen hevur so fingið nakað at hugsa um, nú hann við egnum eygum hevur sæð, hvussu stór og ógvuslig offshorevinnan er. Hetta er eitt ótrúligt skip. Øll tann nýggjasta tøknin og so er alt so stórt sigur ein heldur hugtikin sjóvinnustjóri, sum eisini fegin sær, at skip av hesum slag leggja upp í Føroyum. Mynd - Tommy Petersen, sjóri í Sjóvinnustýrinum frammanfyri AMC Connector. Myndatøka - Oljan.fo/Jan Müller SÍGGIÐ EISINI MYNDARØÐ FRÁ VITJAN UMBORÐ AÐRASTAÐNI